# Hvat er upp á spæl

**Vinnarin av Prix Føroyum fær allan heiðurin og æruna og harafturat eina viku í einum donskum upptøkuhølum. Men nógvar aðrar gularøtur eru at býta millum teir átta bólkarnar, og tær er vinnarin av sjálvari finaluni ikki sjálvskrivaður til at fáa.**

*Rúnar Reistrup*

Ikki bara gull og krýning eru at vinna á Prix Føroyar finaluni hesaferð. Tann, ið fær flest stig frá dómarunum og harvið fær heitið »vinnari« hevur bara vunnið ein av fleiri vinningum, sum eru upp á spæl.

Harafturat koma vinningarnir, sum allir teir átta finalubólkarnir hava tryggjað sær bara við at luttaka.

Ikki allir vinningarnir eru sjónligir og nakrir vísa seg ikki fyrr enn seinni. Umtala og teir fimtan minuttirnir í beinleiðis útvarpi og sjónvarpi, sum finaluframførslan varir, er góð marknaðarføring hjá bólkum, og tí er tíðin aftaná Prix finaluna eitt gott høvi hjá bólkum at geva fløgu út ella selja seg til konsertfyriskiparar. Á hesum økinum er tað ikki altíð at bólkurin, sum gerst nummar eitt í kappingini, eisini fær mestu umtaluna ella verður mest eftirspurdur aftaná. Her er tað heldur tokkin millum fólki, sum er avgerandi.

Tað vita bólkarnir fullvæl, og tí er tað heldur ikki uttan orsøk, at flestu teirra vilja vera við, at tað mest umráðandi á Prix finaluni er, at áhoyrarunum dámar framførsluna hjá teimum.

## Útlendsk oyru

Men í Norðurlandahúsinum komandi leygarkvøld sita eisini nøkur oyru, sum bólkarnir serliga gjarna vilja vinna tokkan hjá. Ein av teimum átta bólkunum á Prix finaluni fær høvi at spæla á Jelling Musik festivalinum 26. mai í ár, og ein fær høvi at fara á pall á Nibe festivalinum 29. juni.

Festivalarnir hava hvør umboð í Føroyum, sum hava sum uppgávu at gera av, hvønn av teimum átta bólkunum, sum luttaka í Prix finaluni, teir helst vilja hava at spæla á sínum festivali.

Harafturat eru umboð frá tveimum plátufeløgum í Danmark og einum úr Svøríki í Føroyum í sambandi við Prix finaluna, og tað sama eru tvey fólk frá danska undirhaldstónleikafelagnum. Blaðfólk frá donsku bløðunum Musikeren, Jyllands Posten og Politiken koma eisini til Føroya í samband við Prix finaluna.

Prix finalan er soleiðis ein vælkomin sýnisgluggi hjá bólkum, ið hava ambitiónir sum strekkja seg út um føroysku landoddarnar.

## Festivalarnir

Teir báðir festivalarnir, sum í summar hava umboð frá Prix Føroyum á skránni hoyra til millum teir miðalstóru donsku festivalarnar, sum ikki hava stór útlendsk nøvn á skránni, men hinvegin hava eitt breitt úrval av teimum best umtóktu nøvnunum í Danmark at bjóða uppá.

Jelling Musikfestival, sum hevur tólv ár á baki, stílar eftir at hava góð donsk nøvn sum høvuðsnøvn. Á festivalinum eru tríggir pallar, »Scenen« har tey flestu av teimum stóru nøvnunum spæla, »Telt scenen« har eisini nøkur av størru nøvnunum spæla, og teltið »Alfreds Bøverding« har bólkar, ið ikki enn eru vorðnir kendir, spæla. Tað er í hesum telti at ein av teimum átta luttakarunum á Prix finaluni fer at standa leygardagin 26. mai.

Í ár hevur Jelling festivalurin nógvar av teimum donsku bólkunum, sum hava verið frammi hetta farna árið, harímillum Outlandish, Safri Duo, Erann DD og eisini nøkur av góðu gomlu nøvnunum innan danskan rocktónleik millum onnur Kim Larsen, Sanne Salomonsen og Sort Sol. Á festivalskránni sæst eisini hálvføroyski gentubólkurin Creamy.

Hin festivalurin, sum hevur Prix Føroyar umboðan, Nibe festivalurin, verður í ár tann 17. í røðini og eins og Jelling festivalurin er skráin pakkað við teimum kendu donsku popp og rock nøvnunum. Nibe festivalurin er nakað størri enn Jelling festivalurin og hevur eisini nøkur útlendsk nøvn á skránni, men talan er tó ikki um tey mest kendu. Tey bæði útlendsku høvuðsnøvnini hesaferð eru Runrig úr Skotlandi og The Hannas úr Írlandi.

Fyriskipararnir handan Nibe festivalin nevna tvær orsøkir til at teir hava valt at lata ein bólk frá Prix finaluni spæla á festivalinum. Onnur er, at teir meta tónleikaumhvørvið í Føroyum vera progressivt og gróðrarríkt. Hin er ein vón um at føroyski bólkurin fer at lokka tey nógvu føroysku lesandi í Aalborg økinum til festivalin.

Bólkarnir á Nibe festivalinum spæla á fýra pallum. Tann størsti er uttandura, tveir eru í teltum og tann minsti er í einari barakk. Umboðið frá Prix Føroyum spælir í einum av teltunum.

## Høvuðsvinningurin

Høvuðsvinningurin á Prix Føroyum 2001, vinningurin sum verður latin tí bólkinum, sum dómararnir kjósa at vera tann besta av teimum átta finalubólkunum, er ein vika í upptøkuhølunum í Lundgaard Studio í Suðurjútlandi. Tað er Mentamálastýrið sum letur hendan vinningin.

Á Lundgaard Studio fáa tónleikararnir eisini innivist og undir upptøkunum fáa teir hjálp frá einum upptøkuteknikara.

Um vinnandi bólkurin velur at geva upptiknu løgini út á fløgu ella brúkar upptøkurnar til onnur endamál er upp til bólkin sjálvan.

## Prixfløgan

Ein vinningur, sum allir teir átta bólkarnir á finaluni longu hava tryggjað sær, er at teir fáa eitt av sínum løgum útgivið á livefløguni, sum Útvarp Føroya ger og gevur út ein lítlan mánað eftir Prix finaluna.

Hetta við at gera eina fløgu burturúr teimum upptøkum, sum Útvarp Føroya ger á finaluni, varð fyrstu ferð roynt í samband við Prix ‘99, og tá var úrslitið ein dygdargóð fløga, sum seldi væl.

At fáa eitt lag útgivið á fløgu letur upp fyri møguleikanum hjá bólkum at fáa eitt av løgum sínum spælt í útvarpsrásunum og møguliga at koma á teir ymisku hitlistarnar í Føroyum.

## Bólkarnir á Prix Føroyar finaluni fara á pallin í hesi røð:

1. Týr
2. I Am
3. Tám
4. Tangz
5. All That Rain
6. Clickhaze
7. Flux
8. 200

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR

## Skráin hjá Jelling festivalinum 2001

**Hósdag 24. mai**

Alfreds Bøverding:
Rust
Copy Right
Sixty Four
Johnny Nørmølle & Nordfolk
The Powls

Scenen:
Outlandish
Hopscotch
Lis Sørensen
Pretty Maids
Lars Lilholt Band

Telt Scenen:
Anne Dueholm & Henrik Kunz Duo
Safri Duo
Olesen & Olesen
Kick The Kangaroo
Danser Med Drenge

**Fríggjadag 25. mai**

Alfreds Bøverding:
JJ & His Blues Engine
Søren Krogh
Back Soon
Pure 80 `ties
The Wang Dang Doodle Band

Scenen:
Creamy
Zididada
Allan Olsen
Sort Sol
Chumbawamba

Telt Scenen:
J. Tex
Natural Born Hippies
The Anthology Of The Beatles
Åge Aleksandersen
Killer Queen

**Leygardag 26. mai**

Alfreds Bøverding:
Peter & Stoffer
Little Beavers
Umboð frá Prix Føroyum (kl. 16.30)
Cross, Schack & Ostermann
Flower Pot Party

Scenen:
Michael Learns To Rock
Sanne Salomonsen
Kim Larsen & Kjukken
Erann DD
Andrew Strong

Telt Scenen:
Kim Sjøgren
Johnny Madsen
Bissens Time
Savage Affair
Tim Christensen

Meira fæst at vita um Jelling Musikfestival á adressuni www.jellingmusikfestival.dk

## Skráin hjá Nibe festivalinum 2001

**Hósdagin 28. juni**

Hestepladsen:
Blå Øjne
Sanne Salomonsen
Erann DD
Lars Lilholt Band

Mellemscenen:
Outlandish
Safri Duo
Briskeby
All Star Grease

Henrik Strube Trio:
Earl Thomas
The Hannas
The Bats

Den Lille Fede:
Blue Magic
Millennium
(Ikki upplýst)

**Fríggjadagin 29. juni**

Hestepladsen:
Lis Sørensen
Søren Sko
Johnny Madsen
Runrig

Mellemscenen:
Infernal
Ivan Pedersen Band
Great Big Sea
Tim Christensen
Prawns With Horns

Måneskin:
Tournesol
Rock Nalle
The Commitments Souvenirs
Umboð frá Prix Føroyum (kl. 23.00 - 00.30)

Den Lille Fede:
(Ikki upplýst)
Mindless
Himmelvand
(Ikki upplýst)

**Leygardagin 30. juni**

Hestepladsen:
Allan Olsen
Shu-Bi-Dua
Zididada
Sort Sol
Big Fat Snake

Mellemscenen
S.O.A.P
Åge Aleksandersen
Pretty Maids
Nikolaj & Piloterne
Absolute Let´s 80´s

Måneskin:
The Powls
Olesen Olesen
Hopscotch
Kick The Kangaroo
Neil Brophy Band

Den Lille Fede:
Uninhibited
Movement
Peter Larsen Band
Høst

Meira fæst at vita um Nibe festivalin á vevadressuni www.tvdk.dk/nibefestival



**VIÐMERKINGAR**

# Himmalbrævið má aldrin endurprentast

**Steinbjørn B. Jacobsen**



Nakað herfyri reksaði Anita á Fríðriksmørk alt upp av ítøkiligum málum, sum hetta Landsstýrið hevur fingið á skafti.

Og hetta er ikki alt, størri helmingurin er eftir at nevna, serliga fullveldismálið, og alt sum hongur uppi í tí.

At rudda upp í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark er ikki lætt og gerst ikki eftir einum degi, enn minni at fáa okkum eitt støði at standa á, ið eisini heldur í altjóða rætti. At fáa sannleikan um danskan politikk í Føroyum fram, er ikki bara sum at siga tað. Hvat meintu teir, tá ið teir søgdu: »Valget er jeres. Vi vil respektere de færøske ønsker«.

Hvussu langt vildu teir ganga. Vóru teir so líka glaðir, sum teir lótust. Og Hin føroyski Javnaðarflokkurin. Hvat vildi hann og hvussu nógv læt hann seg fjarstýra av danska javnaðarflokkinum?

Hvussu kundi man fáa føroyingar at skilja, at teir donsku pengarnir, sum komu til Føroyar, vóru gjald fyri at eiga okkum og hvussu skuldi ein fáa føroyingar at skilja, at teir donsku pengarnir vóru sum eitur fyri føroyska búskapin.

At leggja planbúskapin og stuðulsbúskapin aftur um bak.

At hin hálovaða Heimastýrislógin var ólesandi sum eitt bliknað Himmalbræv.

Tað eru bara trý ár síðan, at tríggir ymsir flokkar samdust um eina samgongu og Landsstýrið fór til verka við tað sama. Nógv spáddu teimum ikki langa livitíð, men teir hava hóra undan og mugu gera tað til endan av valskeiðnum, hóast áangurin móti teimum hevur verið ógvusligur, bæði frá dønum og andstøðuni, serliga javnaðarflokkinum, sum er dottin niður á eitt óhugnaliga lágt støði, og uttan undantak gongur ørindi fyri donsku stjórnina. Øll vápn vóru og eru loyvd. Nær hava teir bara so mikið sum ivast í, at danir hava gjørt nakað skeivt í Føroyum? Grátuligt, men eisini láturligt t.d. at Landsstýrið skal hava skipað fyri, hvat Ekstrablaðið skrivar um undirgrundina og oljuna, ella at tað er teirra skyld, at høgtstandandi danskir javnaðarmenn siga, at teir eiga oljuna.

Skilir javnaðarflokkurin ikki sína egnu støðu. Nú hava teir sitið í andstøðu í trý ár. Og hvat er komið burtur úr. Gongur flokkurin fram? Hava teir eitt program, sum er borðbart? Kunnu teir veruliga ikki standa á egnum beinum og loysa seg úr bondunum frá danska javnaðarflokkinum.

Hetta Landsstýri hevur savnað meir enn helmingin av fólkinum aftan fyri seg, í sjálvum sær ein søgulig hending, tí teir skilja og hava fingið henda stóra bólk av fólki tilfulnar at skilja, at fullveldismálið er málið yvir øllum málum, sum nú má loysast.

Ein hugburðsbroyting, eitt virkisfýsni og fRískt bjartskygni er so sjónligt, at tað burturforklárast ikki, og nógv ung vælútbúgvin fólk koma aftur til heimlandi. Vónandi verður ikki val fyrrenn um eitt ár, tá kunnu teir tríggir flokkarnir siga frá sínum flokspolitisku meiningum, men minnast til, at teir mugu taka eitt fýra ára skeið afturat, tí enn stendur nógv í hálvum gekki, og Rom var ikki bygdur eftir einum degi, somuleiðis má veljarin hugsa um støðuna longu nú. Tíverri skal eitt undur henda, um nakar av teimum trimum flokkunum kunnu fáa gagn av at arbeiða saman við javnaðarflokkinum. Manning og leiðsla í hesum flokki verður tann sama, og hon ger ongar broytingar, hvørki so ella so. Nú er hon meiri sambandsk enn sambandsflokkurin. Hvør hugsandi unglingi vil fara upp í henda flokk og royna at endurnýggja hann? Tað hevði hann heldur ikki sloppið.

Søgufólk fara nakað at gita, um Marita Petersen kundi havt reddað flokkin. Men tað hevði hon aldrin sloppið at gjørt. Kjarnuveljarnir og leiðslan skrála tað góða gamla konservativa herrópið: »Tað skal vera sum tað er, og blíva sum tað var«. Himmalbrævið prentast av nýggjum. Vit mugu nú skilja, at tað hevði verið eitt óbótaligt afturstig fyri okkum øll eisini javnaðarveljarar, men sjálvandi má tað taka sína tíð, og tó er ein veldug hugburðsbroyting longu hend hesi trý árini. Kanska størsti vinningurin.

# Ariel Sharon er Israels Milosevic

**Leif Jacobsen**

De seneste ugers hændelser i Mellemøsten understreger kun, at det israelske folk valgte en krigsforbryder til ministerpræsident.

Hver lejr, landsby og by i de palæstinensiske områder er nu erklæret for et fængsel. I stedet for at arrestere palæstinensiske terrorister og dermed være nødt til at bygge endnu flere fængsler og betale regningen for deres anholdelse, har Ariel Sharon simpelthen instruere hæren til at grave skyttegrave og bygge barrikader omkring deres beboelsesområder, således med et snuptag er palæstinenserne isoleret fuldstændigt. Hvor end du er, er du anholdt, for egen regning og i dit eget hjem. Retsvæsnet er næsten også sparet væk, i alt fald når det drejer sig om palæstinensiske terrorister. I de første par dage benyttede israelerne kamphelikoptere imod udvalgte formodede terrorister, derefter angreb ind i flygtningelejre for at udføre en dødsdom uden rettergang.

Skolebørn kan ikke nå deres skoler og studerende må blive hjemme. Nogle af dem vil prøve at klatre over barrikaderne eller gå rundt i skyttegravene. Nogle tager chancen! Efter timer af fortvivlelse finder de måske en tank (eller flere), som ligger og venter på dem. Måske finder de snigskytter på en bakketop eller armerede køretøjer i et vejkryds.

Alle patienter som modtager behandling (inklusive kraft-, nyre- og hjertepatienter) forbydes nu også at nå deres hospitaler og klinikker. De skal lide i stilhed og dø i stilhed. Alle gravide kvinder må føde i deres egne hjem eller i ambulancer og ved kontrolsteder, hvis de tør trodse belejringen. Hvis de får komplikationer, som leder til deres børns død (eller til deres egen død), har de ifølge Ariel Sharon kun sig selv at lægge skylden på. Alle mødre skal vide, at ingen vaccinationer vil være tilladt at nå deres børn.

Alle forretningsindehavere, handelsmænd, industrimænd, bygningsarbejdere, forretningsmænd er hermed forhindret i at foretage sig i enhver form for indbringende aktivitet. Da de ikke kan gå nogen steder alligevel, kan de ligeså godt blive hjemme og se deres familier sulte, selvom supermarkedet er fuld af varer.

Ariel Sharons nye politik med den ”stærke arm” er afslutningen på fredsprocessen i Mellemøsten, men en fortsættelse af Sharons overtrædelser af menneskerettighederne. Især tre hændelser på hans generalieblad gør ham til en krigsforbryder på linie med Slobodan Milosevic.

Den første fandt sted i 1953, da en styrke under hans kommando angreb Qibya, en landsby på Vestbredden, og dræbte mere end 60 indbyggere. Den israelske historiker Benny Morris skriver, at Sharons enhed modtog ordre om at gennemføre ”ødelæggelse og så mange drab, som muligt”, for at gengælde en palæstinensisk terrorists angreb foretaget et andet sted. Et samtidig Time magasin referat sagde, at Sharons soldater skød ”hver eneste mand, kvinde og barn de kunne finde” og derefter sprængte 42 huse, en skole og en moske i luften. ”Skrigene fra de døende” refererede Time, ”kunne høres under eksplosionerne.”

Sharons selvbiografi erkender at civile blev dræbt i Qibya, men han benævner dødsfaldene som en fejltagelse. Men set i lyset af kilderne, synes hans forklaring imidlertid ikke overbevisende. Ifølge international lov ville Sharon kunne blive sat under anklage for forbrydelser mod menneskeligheden, som inkluderer systematisk og bevidst drab af civile under krigshandlinger.

Det andet tilfælde fandt sted under Israels 1982-fremstød ind i Libanon, da Sharon var forsvarsminister og kampagnens hovedarkitekt. I tre måneder belejrede israelske styrker Vest Beirut, hvor palæstinensiske guerillaer havde forskanset i blandt den civile befolkning. Dengang skrev en Washington Post korrespondent, at Sharons hær udsatte byen for ”afstraffelse så intens og vilkårligt, at terror var resultatet.”

Den 16. august 1982 var Beirut, ifølge International Herald Tribune, blevet en by af ”smadret beton, beboelseshuse jævnet med jorden og død.” Tusinder af civile libanesere døde i denne forbindelse. Erfarne israelske journalister fremfører tvingende beviser på Sharons ansvar for Beiruts prøvelser. Zeev Schiff og Ehud Yaari skrev i juni 1982, at Sharon sagde til sine officerer, at palæstinensiske kvarterer i Syd Beirut skulle ”fuldstændig ødelægges,” selv om der boede 85.000 civile. ”Ikke et eneste terrorist-kvarter skal blive stående,” sagde Sharon efter forlydende. Sharon hævdede senere, at bombardementerne var nødvendige for at stoppe palæstinensisk terror og at palæstinensiske guerillaer selv var skyld i Beiruts civiles død ved at gemme sig blandt ikke-kæmpende.

Selv om guerillaerne brød international lov ved at søge ly i en by, så forbyder Genevekonventionen vilkårlig og uforholdsmæssig bombardement af befolkede områder.

Femten år senere anklagede domstolen vedrørende krigsforbrydelserne i det tidligere Jugoslavien den bosniske serber leder Radovan Karadzic for et tilsvarende angreb på Sarajevo, selvom bosnisk-muslimske soldater var stationeret over hele byen.

Det tredje tilfælde – den berygtede massakre på Sabra og Shatila – fandt sted fra den 16.- 18. september 1982 mod slutningen af slaget om Beirut. De kristne falangister, en Israel-allieret libanesisk milits, blev beordret af Sharon til at udrense bevæbnet modstand i palæstinensiske flygtningelejre, mens israelske styrker holdt vagt. Ifølge den israelske militære efterretningstjeneste dræbte kristne falangister 700 til 800 civile, men palæstinensiske kilder anslår at 2000 døde. New York Times journalisten Thomas Friedman så ”grupper af unge mænd i tyve- og trediveårsalderen, som var linet op væggene, bundet på deres hænder og fødder, og så mejet ned i gangsterstil.” Kvinder, børn og ældre var også blandt dem, der blev slået ihjel i det 62-timer lange angreb.

Selvom Sharon fralægger sig ansvar, afsagde en israelsk undersøgelseskommission kendelse om at han bar ”indirekte ansvar” for massakrerne og fordømte ham skarpt for hans rolle.

I 1985 hævdede en U.S. Military Law Review analyse, at Sharon havde ”ansvar som øverstkommanderende” for drabene. I 1999 blev den tidligere serbiske leder Slobodan Milosevic anklaget af domstolen vedrørende krigen i det tidligere Jugoslavien ifølge en tilsvarende paragraf for Serbiens forbrydelser i Kosovo.

Hvordan kan nogen overhoved forestille sig at byde repræsentanter for denne krigsforbryder indenfor?